

Thomas J. Askham

# Nú skal rúsdrekkalógin dagførast

*Tað liggur á ljóði, at í ár kemur uppskot á tingi at dagføra rúsdrekkalógina, sum tað nevnist*

Nú kann ein velja, um ein ynskir at luttaka í orðaskiftinum um hetta mál ella ein vil gera brúk av teimum demokratisku rættindum, ein hevur at siga sína hugsan og meining um hetta álvarsmál.

Ein kann eisini velja tann hugburð at seta seg aftur á við krossløgdum ørmum og siga, eg ynski ikki at luttaka í orðaskiftinum um hetta mál, tí eg ynski ongar broytingar í rúsdrekkapolitikkinum, grundað á mínar religiøsu ella politisku sannføringar.

Nú skal eingin halda, at eg geri meg til talsmann fyri fríari og ótálmaðari rúsdrekkasølu og -framleiðslu.

Eg eins og onnur avhaldsfólk mugu fyrihalda okkum til nakrar veruleikar, sum eru í okkara samfelag, og sum vit eru ein partur av, og sum vit liva í. Har er rúsdrekka ein partur av degnum hjá nøkrum av okkara borgarum. Um vit nú bert líta nøkur ár aftur í tíðina, so mugu vit ásanna, at stórar broytingar eru hendar á rúsdrekkaøkinum. Rúsan er komin, ein stórur partur av matstøðunum hava fingið skeinkiloyvi til vín og tað, sum sterkari er.

Nú skal rúsdrekkalógin broytast. Tað eitur, hon skal dagførast. Tað sigur mær so mikið, at tað er nakað, sum ikki er í pakt við nútíðina.

### Ikki súltutoys- ella ostavinna

Endamálið við at dagføra rúsdrekkalógina skal óivað skiljast so, at hon má verða í takt og pakt við rákið, sum er í tíðini.

Ofta, tá orðaskifti taka seg upp um at broyta lógir, so er tað tí, hesar lógir eru gamlar. Tær hóska ikki til tíðina, tí skulu tær dagførast fyri at fylgja tíðini, vit liva í.

Tað er neyvan nakar, sum er so naivur, at hann ikki heldur, at nú rúsdrekkalógin skal dagførast, so er tað til at liberalisera og at leggja lunnar til eina víðkaða bryggjaríivinnu.

Tað hevur ligið leingi á ljóði, at verandi rúsdrekkalógin leggur fótonglar fyri eini útvikladari bryggjarívinnu her á landi.

Okkara politikkarar, sum skulu taka avgerð um hetta, mugu ikki gloyma, at vit tosa um ein vørubólk, sum kann hava ávirkan samfelagsligt og sosialt.

Eg sigi ikki, at rúsdrekkamisnýtslan økist, um ein víðkað bryggjarívinna kemur her á landi. Tað, ið okkara politikkarar eiga at hava í huga er, um teir ætla at lata upp fyri eini útvikladari bryggjarívinnu, so eigur henda vinnan at bera ein part av kostnaðinum, hvat tað kostar at hava avrúsunartilboð, og hvar tað kemur at kosta samfelagnum Føroyar á heilsuøkinum.

Vit mugu ikki gloyma, at vit tosa ikki um eina súltutoys- ella ostavinnu.

### Frí rúsdrekkasøla

Í desember mánað 2010 kom eitt av bløðunum við eini forsíðuyvirskrivt, sum ljóðaði fylgjandi:

Fyri fríari rúsdrekkasølu. Sagt varð frá eini spillfrískari kanning, sum vísti, at vit føroyingar vilja hava rúsdrekka út í handlarnar.

Blaðmaðurin, sum ummælir hesa kanning, tosar um, at politikkarar okkara fara í baklás av rúsdrekkaspurninginum, tó verður sagt ein bólkur av tinglimum.

Vit kunnu bert ímynda okkum myndina og skilið, um vit høvdu havt hetta í handlunum, vit hava júst fingið at vita, at so at siga einki hindur er fyri hjá blaðungum at fara í Rúsuna at keypa sær eitthvørt drekkandi.

Persónliga eri eg ikki so sannførdur, um rákið og kanningar siga, at tað er tann rætti vegurin fyri samfelagið Føroyar at fara. Her verður neyðugt hjá okkum og politikkarunum at leggja oyra til, hvat serkunnleikin innan fólkaheilsu hevur at siga okkum.

Formaðurin fyri fólkaheilsu sigur í tí greinini, at fáa vit fría rúsdrekkasølu í Føroyum, skulu vit bara vita, at bæði tann menniskjansliga og tann samfelagsliga rokningin verður stór.

Hann heldur fram at siga, at í takt við at rúsdrekkanýtslan økist, so økjast eisini heilsuligu og samfelagsligu avleiðingarnar fyri samfelagið.

Formaðurin fyri Fólkaheilsuráðnum nemur við, hvat rúsdrekka skaðar í djúpastu merking, so sum arbeiðsevnini hjá fólki oyðileggjast. Eisini kann tað oyðileggja evnini at vera familjumenniskja og evnini at virka sosialt og at liva og virka millum fólk.

### Vit mugu vera sum hini

Taktfast ljóða loysingarorðini gjøgnum tað almenna rúmið, alheimsgerðin. Vit mugu líkjast grannalondunum bæði so og so, lógin má broytast til tað rákið, sum er uppi í tíðini.

Hví er tað so alt umráðandi at verða og blíva sum hini?

Hví kunnu vit ikki verða, sum vit eru sum fólk og tjóð? Vit mugu ásanna, at vit eru smá og fá, og tí er skjótt at missa sín samleika sum fólk.

Mæta skald okkara Poul F. Joensen hevur týtt sangin "Av øllum londum í eyst og vest". Har byrjar hann í ørindi átta: Vit eru føroyingar serstøk stjóð.

Eg hugsi ikki, at vit kunnu taka hesa sangstrofu til okkum, um vit alla tíðina skulu arbeiða og flyta tjóð okkara mentanarliga og í aðrar mátar móti nútíðarinnar rákið, sum einans setur egoistin í okkum menniskjum í miðdepilin í hásæti.

Lat okkum dvølja við eina aðra kanning (statistik) úr Danmark, har hvar so mangt er liberalt, frítt og so opið og hartil so deiligt, sum sagt verður.

Er tað hetta, vit skulu arbeiða fram ímóti? Er tað hetta, okkara politiski myndugleiki skal dagføra rúsrekkalógina til frama fyri? Er tað hetta, vit ynskja at leiða okkara unga vakra ættarlið inn í?

Tann 1. februar 2011 skrivar Sosialurin, hvussu nógv doyggja av rúsmisnýtslu í Danmark. Í 2009 doyðu yvir 50 fólk undir 30 ár í Danmark orsaka av rúsmisnýtslu, 276 rúsmisnýtarar doyðu í Danmark í 2009 av tí harða lívinum, sum misnýtslan elvir til. Hetta eru 38 fleiri enn í 2008 og 17 fleiri enn í meðal tey seinastu tíggju árini.

52 av misnýtarunum náddu ikki at fylla 29 ár, og tríggir vóru millum 14 og 18 ár.

Teir flestu misnýtarar doyggja í høvuðsstaðarumráðnum Keypmannahavn, har talið økist skjótt.

Hetta er dapur lesnaður, hann er neyðugur at hava við, nú tosað verður um at dagføra og broyta rúsdrekkalógina til frama fyri eina meiri liberala rúsdrekkalóg og til at fáa størri bryggjarívinnu her á landi, sum eisini skal umfara brennivínsbryggjan.

Jú taktfast eins og hernaðarljóð gjella rópini í tí almenna rúminum her á landi, um alheimsgerð, liberalisering, frígering frá andaligum virðum og áskoðanum.

Vit hava sæð, hoyrt og lisið hesa seinastu tíðina, at fjølmiðlarnir hava brúkt nógva orku uppá at lýsa ymiskar samfelagsligar spurningar innan politikk, átrúnað og vinnulív.

Tað ein hevur heft seg við, er eitt sera óheppið rák innan málnýtsluna hjá luttakandi persónum (tó ikki øll). Tað er í ordan, at ein ikki er samdur í átrúnaðarligum spurningum, og tað sama er galdandi í politiskum spurningum.

Hví skulu tey, sum ganga inn fyri tí átrúnaðarliga verða happað og niðurgjørd, ja, nærum svínað til í slíkum sendingum? Hví skulu vit hava slíkar sendingar, sum niðurgera okkara politikkarar á ein slíkan hátt, at vit koma at uppala eitt ættarlið, hvørs virðing fyri okkara politiska stýrið kann liggja á einum lítlum stað? Hetta primitiva málbrúk í okkara fjølmiðlum fremur ikki nakran góðan anda í tí føroysku fólkasálini. Hava fjølmiðlar og fjølmiðlafólk ongi sømilig mørk, sum siga teimum, at hetta er ov groft.

Tað skal ongin halda, at eg ikki dugi at síggja, at ikki alt er perfekt innan átrúnað og politikkk, men tað gevur mær ongan rætt at niðurgera og navngeva persónar innan politikk og átrúnað í slíkum í sendingum. Okkum tørvar ikki at vera sum hini.

### Rúsdrekkagrunn

Um nú okkara politikkarar viðtaka, at í Føroyum skal bryggjast sterkari øl, og at brennivínsframleiðslan skal kunna flyta heim úr Íslandi, so vóni eg, at ein politiskur meiriluti verður, sum kann bera so í bandi, at ein rúsdrekkagrunnur verður settur á stovn.

Hesin grunnur kann verða brúktur til at fíggja tað upplýsandi arbeiðið av avleiðingunum av ovurnýtslu av rúsdrekka.

Somuleiðis kundi grunnurin verði við at borði kostnaðin av, at vit hava viðgerðarstovnar, sum kunnu hjálpa rúsdrekkamisnýtarum.

Ein máti kundi verði, at eitt ávíst % tal fór av hvørjari fløsku ella hvørjum litur, tá kundu onnur gjøld verið broytt, so at hetta ikki kom at virka sum eitt nýtt avgjald aftrat.

Vit verða noydd at fyrihalda okkum til tann veruleika, at rúsdrekka er komið fyri at verða í okkara samfelag. At billa sær inn, at oyggjarnar verða turrlagdar, er at verða ov naivur.

Mín vón er at tað verður borið so í bandi, at tað verður hugsað um tey, sum blíva bundin av rúsdrekka, kunnu verða hjálpt til at fáa ta neyðugu hjálpina. Her kann ein rúsdrekkagrunnur verða til stóra hjálp hjá viðgerðarstovnunum.

Vón mín er, at allar politiskar kreftir, sum vilja minimera skaðan av frælslyntari rúsdrekkavinnu finna saman og arbeiða málrættað fyri einum skilagóðum rúsdrekkapolitikki.

### MBM/Rúsan

Nú ið rúsdrekkalógin skal dagførast møguliga til frama fyri Rúsuna og fyri bryggjarívinnuna, er tankin óivað at menna útflutning av øli og brennivíni.

Ein onnur vinna situr í bíðistøðu eftir okkara politikkarum. Her er eisini talan um eina útflutningsvinnu. Sum skilst, er tað partvís Hoyvíkssáttmálin og EU fótonglar, sum forða fyri, at MBM ikki kemur víðari.

Hetta eru tað bert okkara politikkarar, sum kunnu gera nakað við, tá nú tit eru farnir at dagføra rúsdrekkalógina. Hví ikki fáa dagført tað, sum er neyðugt at dagføra, so MBM kann byrja at útflyta vørur.

MBM-vøran var væl fagnað í Rumenia, tá vit fingu mjólkaúrdráttir sum gávu við okkum. Hetta bleiv sera væl móttikið. Tí ivist eg onga løtu, at vøran frá MBM í góðsku er fult kappingarfør við aðra líknandi vøru á marknaðinum. Tá tað kemur til kappingarføri í prísi, kenni eg ikki umstøðurnar.

Ofta fær ein kensluna av, at áhugin fyri at hjálpa virkjum, sum arbeiða við aðrari vøru og hugskotum, sum ikki hevur stert, ger, at avvarðandi bankafólk og politikkarar blíva meiri fjarir í andlitinum, og eyguni fara at sveima. Eg eri greiður yvir, at henda mín grein bleiv sveimandi. Mín vón er, at tikið verður hædd fyri avleiðingunum av rúsdrekka.

Jú, eg hoyri kórið, sum kvøður at vit duga at drekka og umgangast rúsdrekka. Nei, tað eru ikki tey, sum frísk eru, sum hava eina læknavitjan fyri neyðini. Tað er tann sum sjúkur er.

Tað er tann, sum hevur hjálpina fyri neyðini sum er í mínum tonkum í hesi grein.


## TVINGSILS-SØLA

Týsdagin tann 31. maj 2011 kl. 09.15, verður á Dómaraskrivstovuni í rættarsali IV, undir Glaðsheyggi 14, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir matr. nr. 334, Klaksvík.
Fyrireikandi rættarfundur verður týsdagin, tann 10. maj 2011 kl. 09.15.
Ognin er ein virkisbygningur til støddar uml. 260m2 í tveimum hæddum, sum verður nýttur til matstovu. Grundøkið er uppá 278m2
Talan er um ein bygning í tveimum hæddum. Bygningurin er klæddur við timbri og taktur við zink.
Bygningurin er innrættaður soleiðis:
Niðara hæddin: Durur, café, køkur og tvey wc
Ovara hæddin: trappuuppgongd, matstova, køkur, durur og tvey wc.
Burtursæð frá takinum, so er bygningurin í góðum standi bæði innan og uttan.
Sølan er umbiðin av Fríðu Patursson, advokati, Frúutrøð 4, Tórshavn, tlf. 35 33 35, e-mail frp@jura.fo (j.nr. 20100909), ið kann geva nærri upplýsingar og útflyggja tvingilssøluuppstilling, og sum nærri avtala kann gerast við, um ynskt verður at síggja ognina.

FÚTARÆTTURIN